
## Vanabundin og evniskunnandi undirvísing

Í bókini PROJEKTARBEJDE eftir Jens Berthelsen o.ø. verður vanabundin undirvísing borin saman við evniskunnandi undirvísing á henda hátt:



Nýggja skúlalógin fær skyldina!

1. partur

# Kreppa í framhaldsskúlanum

### Næmingarnir eru óvirknir og troyttir av skúlanum
### — lærarar kenna seg hjálparleysar og geva skarvin yvir
### — foreldrini kenna seg hjálparleys
### — og nýggja skúlalógin fær skyldina

Seinasta vikuskifti helt nýggi landsskúlastjórin, Hensar Ellingsgaard, áhugaverdan fyrilestur á skeiði í Vágum, sum Móðurmálslærarafelagið skipaði fyri.

Hann tosaði um gongdina og støðuna í framhaldsskúlanum, nú »nýggja« skúlalógin gongur á 7. ári.

Vit fara her í tveimum bløðum at taka fram nøkur brot úr fyrilestrinum.

Hensar Ellingsgaard segði m.a, at tá hann var biðin um at halda fyrilestur, so kom ivin upp um, hvat evni hann skuldi velja. Og hann helt fram:

Tað sum kom mær til hugs, var sjongurin um, hvussu illa næmingarnir í framhaldsskúlanum tímdu at ganga í skúla, og hvussu nógv tað var broytt hesi árini, síðani nýggja skúlalógin kom.

— næmingarnir eru óvirknir og lítið uppí í.
— næmingarnir eru troyttir av skúlanum.
— næmingarnir eru ófriðarligir, ótryggir og rótleysir.
— næmingarnir eru ólátaðir og láta hánt um læraran og skúlan.
— næmingarnir hava ikki bindindi, og teir geva skarvin yvir.
— næmingarnir skulka sær undan . . . og møta ikki upp . . .

Tað eru eisini teir lærarar, sum geva skarvin yvir og kenna seg máttleysar, og lærararnir siga:
— at tað er fáur — fyri ikki at siga eingin, sum gevur tí høpisleysu støðu, ið tey standa í, gætur.

Og foreldrini?
— nógv kenna seg hjálparleys, tá ið tey skulu stuðla børnunum at velja lærugreinir og skeið.
— nógv siga seg ikki vita av, at børnini ikki hava tær lærugreinir, sum tey upprunaliga hava valt.
— at tað eru alt ov nógvir lærarar um hvønn flokkin.
— at tað er trupult at koma í samband við skúlan og hjálpa til at greiða trupulleikarnar, sum børn teirra hava í skúlanum (hetta siga tey foreldur, sum eiga børn, ið skulka sær undan).



Nýggja skúlalógin fær skyldina!

Men hetta eru ikki ókend fyribrigdi aðrastaðni, segði Hensar Ellingsgaard.

